# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gunnar til miljóningarnar í Manchester City

**Manchester City-venjarin, Mark Hughes, fekk á sinni Gunnar Nielsen til Blackburn Rovers, og nú eru teir aftur í sama felag.**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ungi føroyski landsliðsmálverjin, Gunnar Nielsen hevur skrivað undir sáttmála við heimsins ríkasta fótbóltsfelag, Manchester City. Tað er North Atlantic Football Agency við Jákup í Stórustovu, sum hevur staðið fyri samráðingunum hjá Gunnari Nielsen.

– Slíkir møguleikar koma ikki ofta, og tá teir koma, ræður um at taka teir. Eg havi fingið ein hálvttriðja ára sáttmála, sum teir komu við, og teir góvu eitt gott tilboð. Men nú byrjar harða arbeiðið, sigur Gunnar Nielsen við Rás 2.

– Hetta er somu venjarar, sum fingu meg til Blackburn Rovers, og sum sóu møguleikarnar í mær og trúðu upp á meg. So fóru teir til Manchester City, og støðan broytist í Blackburn. Men tað, at teir nú vilja hava meg til Manchester City, gevur mær eitt ótrúliga stórt sjálvsálit.



*Gunnar Nielsen skiftir frá Blackburn Rovers til Manchester City og fær nú aftur Mark Hughes sum venjara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kappingin verður tó hørð hjá Gunnari Nielsen, tí í løtuni hevur Manchester City tríggjar málverjar til fyrstaliðið, umframt ungar málverjar. – Men tað hugsi eg ikki nógv um, eg má bara dríva á, og fegnast um, at eg arbeiði saman við Mark Hughes aftur, sigur Gunnar.

Spurdur, nær føroyingar kunnu vænta at síggja Gunnar á besta liðnum hjá Manchester City, svarar ungi føroyski málverjin, at tað er ein góður spurningur, sum honum sjálvum lysti at vita.

– Men sum eg hugsi nú, so er hetta ein fantastiskur møguleiki, og teir heinta meg ikki til felagið, bara til stuttleikar. Tað er ein grund til at teir heinta meg, og teir trúgva upp á meg. Nú ætli eg mær bara at dríva á, so mugu vit síggja hvussu langt tað ber, sigur hann.

## Veit hvat fólk vænta

Almenna heimasíðan hjá Manchester City skrivar, at Gunnar Nielsen enn einaferð er sameindur við bæði Mark Hughes og málmansvenjaran, Kevin Hitchcock. Heimasíðan skrivar, at Gunnar er sera spentur uppá at gerast partur av hópinum hjá teimum ljósabláu í Manchester.

– Hetta er veruliga eitt stórt felag, og tað er gott at koma her og kenna onkran. Eg veit, hvat fólk vænta av mær. Eg eri veruliga spentur, tí eg veit, at venjarnir trúgva upp á meg, so eg ætli mær at arbeiða hart í felagnum. Hetta tykist at verða eitt felag, sum hevur stórar framtíðarætlanir, sigur Gunnar Nielsen við heimasíðuna hjá Manchester City.

– Eg havi møtt fólki á venjingarmiðstøðini hjá City, og eg kenni eitt veruligt samljóð í felagnum. Øll tykjast at verða glað, og seta fokus á sama mál. Hetta er eitt gott pláss at koma til. Nógvir fótbóltsspælarar høvdu givið sín høgra arm, fyri at koma í ta støðu, eg eri komin í nú. Sjálvandi er hetta ógvuliga spennandi, og eg ætli mær ikki at søpla hendan møguleikan burtur.

# Hondbóltssambandið strikar karantenur

**Hondbóltssambandið hevur strikað allar karantenur eftir óhepna Bosniatúrin, so nú er eitt nú møguleiki fyri, at Heini Hanusarsson aftur verður at síggja á landsliðnum.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– At allar karantenurnar eru strikaðar, merkir, at allir spælarar eru líka stillaðir á landsliðnum í løtuni og at landsliðsvenjararnir hava




*Hondbóltssambandið strikar allar karantenur eftir óhepna Bosniatúrin, so nú kunnu landliðsvenjararnir frítt velja sær 14 teir bestu av øllum føroyskum hondbóltsspælarum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

møguleika at taka allar spælarar út, sigur Kristian Johansen, formaður í Hondbóltssambandinum, við Rás 2.

– Vit hava tikið hetta stigið nú, so vit aftur kunnu fáa frið yvir landsliðið. Vit hava ikki verið undir trýsti frá nøkrum, men vóna, at hetta kann føra til, at kapping verður um øll pláss á liðnum og at vit fáa eitt gott støði at standa á.

Hetta stigið hjá Hondbóltssambandinum merkir, at venjararnir fáa munandi betri møguleikar at fyrireika seg til komandi landsdystirnar, sum verða í næsta mánaði, tá Føroyar fyrst spæla ímóti Sveis á heimavølli 18. mars og síðani á útivølli tríggjar dagar seinni.

## Lættir um arbeiðið

Dia Midjord, landsliðsvenjari, visti einki um avgerðina hjá Hondbóltssambandinum, men sigur seg vera fegnan um hana, samstundis sum hann aftur gloppar dyrnar fyri Heina Hanusarsson, sum annars hevði fingið karantenu restina av hesi EM-undankappingini.

– Eru karantenurnar strikaðar, so taka vit 14 teir bestu spælararnar út. Og tað merkir, at eisini Heini Hanusarsson kann verða tikin út, um hann telist millum 14 teir bestu, sigur Dia Midjord við Rás 2, samstundis sum hann ásannar, at tað lættir um arbeiðið hjá venjarunum, at karantenurnar detta burtur.

Orsøkin til karantenurnar var, at fleiri av landsliðsspælarunum bókstaviliga komu »lort í býin« allahalgannadag, eftir at Føroyar høvdu spælt ímóti Bosnia niðri í Sarajevo. Men um skilið í samband við útidystirnar í framtíðini vil venjarin tó ikki siga so nógv, men vísir á, at tað altíð hevur verið hampiliga gott skil á ferðunum hjá landsliðnum, og at tað helst skal halda fram.